## VALGREINAR

# Hugsjónarleysir politikarar bera ikki tjóðina fram

**Heini O. Heinesen**
*løgtingsm. framsøgumaður í vinnumálum*



Tað eru hugsjónirnar, ið bera tjóðina fram. Av teimum skapast allur framburður, av teimum sprettir lív. Uttan at taka munnin ov fullan, kunnu vit við æruni siga, at tað hava onganтí verið so nógvir hugsjónarloysingar ið bjóða seg fram til at stýra okkara landi, sum til hetta valið.

Av røttum átti tað at verið so, at allir føroyskir politikara og flokkar teirra stóðu saman um frælsishugsjónina, men so er ikki. Tí mugu vit spyrja: Hvussi kann hetta bera til? Hví hava vit allar hesar hugsjónarloysingarnar í føroyskum polittikki? Hví hava teir undirtøku í føroyska fólkinum?

**Deyðadómspretikantar -samríkisflokana:**
Vit hava tíverri sterkar kreftir sum bevíst royna at taka mótið frá føroyska fólkinum við sínum deyðdómsprætikum. Upp móti hesum armóðs politikki, setur Tjóðveldisflokkurin stevnu sína.

Hvat var tað sum gjørdi at okkara samfelag reisti seg aftur, sum fuglurin Fønix aftaná kreppuna?

Tað var, og er, hugsjónin um eina sjálvberandi føroyska fiski og -alivinnu uttan studning og veðhald, Við góðum stovnsrøktarpolitikki, sum ger, at vit í dag kunnu tosa um ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Tað er hugsjónin um ein góðan og tryggan sosialpolitikk, skúla og mentanar politikk, samferðslu og -íløgupolitikk, o.v. sum byggir á føroyskan búðskap, men ikki á vælvild úr øðrum landi.

Sambandsflokkurin er nú farin at seta myndir av av gomlum vælbjargaðum sambandspolitikarum í bløðini, sum tekin uppá trygdina í Ríkisfelagskapinum

Javnaðarflokkurin er hinvegin farin at gerða innrás á arbeiðsplássini hjá okkara lægstløntu arbeiðarum, og á ellis- og røktaheiminum runt landi. Um hetta eisini er eitt tekin uppá trygdina í ríkisfelags skapinum, veit eg ikki.

Eg vóni bara ikki, at teir gloyma at siga, fyri øllum hesum veljarunum, at teir batar sum eru komnir, og vónandi fara at koma, byggja á tann betraða føroyska búskapin. Um teir siga nakað annað, so siga teir ósatt.

Sum orðatakið sigur: "Tað er vána fuglur sum drýtir í egið reiður"

Hvar var trygdin í ríkisfelagsskapinum tá ástóð? Hon var ikki til. Heldur var tað so, at danir løgdu stein omaná byrðu, við at brúka føroyska landskassan til at bjarga bankunum. Sambandsmenn hava sjálvir sagt at hetta er eitt felagsmál.

Hvat er so boðskapurin frá hesum flokkum? Jú teir vilja í sínum hugsjónarloysi, fyri ein hvønn prís innlima føroysku tjóðina í tað donsku. Tað vil siga, teir eru til reiðar at frásiga sær frumburðarættin til okkara føðiland. Um teir faa makt sum hava teir agt. Teir eru røktingamenn hjá donsku stadsmaktini, uttan at verða bidnir.

Vilt tú forða hesum ørskapinum, fert tú á val og velur Tjóðveldisflokkin 30. apríl

Heimasíða mín:
http://heima.olivant.fo/~hoyh/

# Landið hevur borið seg ljótt at móti traðarmonnum

**Finnur Egholm**
*valevnið Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Vit føroyingar mugu taka róðrið í egnar hendur og stýra skútuni Føroyar sjálvir. Allir føroyingar mugu vera á varðhaldi, so at kósin verður hildin bæði andaliga og fíggjarliga, soleiðis at vit fáa so nógv burtur úr sum tilber.

Tað er Sjálvstýrisflokkurin, sum eigur at vera pápin at loysingini, tí Sjálvstýrisflokkurin vann loysing í 1946, men hetta varð sum kunnugt saboterað av dønum. Hetta er tað, sum Zakaris Wang mangan hevur nevnt. Sjálvstýrisflokkurin hevur vakt og opnað eyguni á hinum flokkunum, soleiðis at teir nú allir eru sprotnir úr Sjálvstýrisflokkinum ella hava bent stevnuskránni móti okkara flokki.

Tí ræður um hjá veljarunum at koma aftur til upprunan, tí skal tað vera rætt, so átti Sjálvstýrisflokkurin at verið størsti flokkur á tingi og ikki næstminsti.

Sjálvstýrisflokkurin hevur gingið undan og ført okkum so nær til sjálvstýri, sum vit eru komin nú.

So vit mugu bara gjøgnumføra loysingina við tí, sum skal til fyri at loysa frá Danmark. Og sjálvandi skal fólkaatkvøða verða um loysingina.

Innast inni trúgvi eg, at allir føroyingar vilja stýra Føroyum sjálvir, eisini sambandsveljarar, tí tá sjógvarnir bróta, ræður um at rættur maður stendur við róðrið, annars fer skipið í sor.

Og í ringasta føri søkkur tað, og manningin verður vónandi bjargað.

Soleiðis kann tað eisini gangast við Føroyum í ringasta føri. Tað er tí umráðandi at hava menn og kvinnur, sum hava givið sítt lív til Jesus Kristus at stýra landi okkara. Eg kann sjálvur vitna tað, at eg sum 22 ára gamal gav mítt lív til Harran Jesus Kristus. Eg eri 44 ár í dag, og hann hevur leitt meg trygt gjøgnum lívið síðani.

**Aftur til tað jørðiska**
Eg heiti á allar menn og kvinnur í Føroyum, sum hava leigutraðir, um at vakna, tí landið vil taka traðirnar frá okkum. Vit mugu broyta lógina, soleiðis at hon verður aftur sum í 1988. Eg havi tosað við formannin í Óðalsfelagnum, Kári á Rógvi, løgfrøðing. Hann heldur, at tað er burturvið ikki at sleppa at keypa gerðini hjá pápa sínum. Eg fari fyrsta dagin at tosa við tveir advokatar um at leggja sak móti landinum. Hetta er ov galið.

Hatta stýrið, sum sat í 1988, var eitt vánastýri, og tað vóru teir, sum gjørdi tað so trupult fyri tann meiniga mannin, ístaðin fyri at biðja allar traðarmenn um at keypa gerðini.

Lýst tað í útvarpinum og sent skriv til allar traðarmenn um at keypa gerðini, í staðin fyri at lumpa eina lóg ígjøgnum. Hetta er vánaligt av landinum at hava gjørt, og tí má hetta broytast, soleiðis at allir traðarmenn fáa gerðini til ognar, tí vit eiga hevdisrætt til gerðini.

Hevur tú átt nakað í 20 ár, so eigur man hevd, og tí má hetta mál leggjast fyri løgtingið til broytingar, soleiðis at tað verður heimilað traðarmonnum at ogna sær gerðini. Landið kann ikki fara við føroyafólki soleiðis. Fyrst biðja tey velja seg og síðani spæla hund við hesum somu. Hetta skal ikki sleppa at ganga meira, tí ræður um at hava eyguni við hvørjum smáluti her á landi, so at alt fer rættvíst fram.

**Brúgvin um Streymin**
Fyri at lætta um við Streymabrúnna kundi eg hugsað mær, at undirsjóartunnil bleiv gjørdur undir Streymin, so at vit fáa ta tungu ferðsluna gjøgnum tunnilin, áðrenn ólukka stendst. Betur er at binda um heilan fingur.

**Kajkant í allari Eiðishavn**
Her á Eiði koma nógvir útróðrarbátar og skip. Tí átti landið at gjørt kajkant inni í allari havnini, áðrenn hon øll skramblar saman, og soleiðis at allir fingu pláss. Eiðishavn liggur so nær havsmunnanum, so at um okkurt er áfatt, koma bátar ofta higar. Skip liggja ofta út fyri mølini á Eiði og kroka. Høvdu hesar umbøtur verið gjørdar, so høvdu tey kunna komið til kaj ístaðin fyri, og ligið trygt. Tað er altíð tryggari at liggja í eini havn.

**Viðvíkjandi fiskarí**
Tað eru fleiri fiskihættir í Føroyum, snella, lína, trol, nót, kalva-, hummara-, laksa- og hemaraveiða. Hesir veiðuhættir er partvíst atskildir. Snellan má fáa nakrar smærri kassar, sum bara eru opnir í november, december og januar, soleiðis at tað ikki bert ber til at royna við snellu í februar, mars og hálvan apríl. Vit kunnu ikki liva bara av tveimum og einum hálvum mánaði um árið. Tí mugu vit fáa nøkur øki hinar mánaðirnar til at royna við snellu á burturav. Hesi øki kunnu allir snelluáhugaðir so semjast um, hvar tey skulu vera.

Tit hava opnað nakrar av snellukassunum norður úr Mýlingi, men vit skulu hava nakrar snellukassar burturav hinar mánaðarnar. Allir skulu liva av veiðuni. Vit mugu ikki drepa snelluveiðuna. Vit mugu arbeiða fyri allar, ikki bara fyri línuna.

Tí har sum línan er, fæst lítið við snelluni. Arbeiða tit bara fyri línuni, so drepa tit snelluveiðuna.

Tí heiti eg á Meginfelagið um eisini at arbeiða fyri snelluútróðrarmannin. Tað má aldrig blíva soleiðis, at tað verður verri fyri snelluna, soleiðis sum tit hava gjørt norður úr Mýlingi. Tit taka breyðið úr munninum á snelluútróðrarmonnunum. Hetta er ein ljót gerð. Tit lumpa og lirka, soleiðis at tit fáa so nógv sum til ber til tykkum sjálvar og leggja einki í hinar. Tit, sum hava gjørt hetta norður úr Mýlingi.

Skal skil fáast á, er neyðugt við einum sterkum Sjálvstýrisflokki á tingi! Veljið tí lista D 30. apríl.

Løgtingsvalið 2002:

# Tað eigur at bera til

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



**Frádráttur hjá føroyskum handverkarum uttanlands**
Føroyskir handverkarar, sum fara uttanlands at arbeiða fyri føroyskar fyritøkur, og ikki sum einstaklingar, eiga at fáa kr. 600 í frádrátti um dagin.

**Hví?**
Tí at tá vinna vit fremmant gjaldoyra til landið, og føroyskar fyritøkur halda seg kappingarførar við tær útlendsku. Samstundis tálma vit stóra byggivirkseminum og vit sleppa undan at seta meira ferð á føroyska búskapin.

**ES-sáttmálin má betrast**
Sáttmálin við ES skal gerast munandi betri, soleiðis at Føroyar hava minst líka góðar treytir í samhandlinum við ES sum londini, vit kappast við.

**Hví?**
Tí at tá kunnu vit t.d. keypa íslendskan fisk, virka hann og selja hann til ES uttan forðingar. Í dag hava íslendingar hendan fyrimunin fram um okkum, tá teir keypa føroyskan fisk.

**Skattastigin skal dagførast**
Ein inntøka um 200.000 - 250.000 kr. verður í dag skattað sum ein háinntøka, hóast hetta er ein vanlig inntøka hjá øðrum hjúnafelaganum í flestu familjum. Progressivi skattastigin má tí dagførast og nútímansgerast.

**Hví?**
Tí at tá verður fíggjarliga byrðan hjá barnafamiljunum lættari at bera og hugurin at arbeiða økist. Eisini bøtir hetta um trivnaðin hjá familjuni sum heild.

**Fleiri málsøki út til kommunurnar**
Fyri at flyta almennu tænasturnar nærri borgaranum, eiga fleiri uppgávur at verða lætnar kommununum at umsita.

**Hví?**
Tí at tá verður m.a. lættari at hava eftirlit við almannaveitingum soleiðis at hesar verða veittar teimum sum veruliga tørva hjálp. Eisini verður lættari at forða fyri at almannaveitingar ikki verða misbrúktar.



## VALGREINAR

# Vilt tú steðga her?

**Bárður Nielsen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Stóra tøkk til Høgna Mikkelsen, byggimeistara, Tú rakti seymin beint á høvdið við tíni grein um stóru lýsingina hjá Tjóðveldisflokkinum.

Við umrøddu myndatalu verður so nógv annað eisini avdúkað.

Tjóðveldisflokkurin viðgongur, hvussu nógv tú kann røkka innan fyri ríkisfelagsskapin.

Við Heimastýrislógini í hondini, og verandi í ríkisfelagsskapinum, hevur verið gjørligt at reisa seg aftur úr øskini.

Høgni Hoydal og Jógvan Arge eru í drúgvari kapping um at vísa á øll avrikini, ið Tjóðveldisflokkurin hevur avgreitt í okkara góða felagsskapi.

Gamaní, við stórum trýsti frá andstøðuni hava teir brúkt møguleikarnar í ríkinum, og tískil er nakað komið frá hondini, men hvar vóru úrslitini hjá samgonguni og serliga hjá Tjóðveldisflokkinum, um eingin tryggur ríkisfelagsskapur var?

Stóra litfagra lýsingin hjá Tjóðveldisflokkinum endar soleiðis :

- VILT TÚ STEÐGA HER?

Sera løgin spurningur! Tóðveldisflokkurin hevur júst broytt okkara fíggjarliga avlop til eitt hall, og tískil hevur flokkurin sjálvur svarað setta spurningi. Tjóðveldisflokkurin hevur longu steðga øllum, og kemur hann aftur til valdið, tekur niðurkøvingin veruliga dik á seg.

# Vel Vælferðarsamfelagið

**Vilhelm Johannesen**
*valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*



Vælferðarsamfelagið er treytað av einum ábyrgdarfullum búskaparpolitikki. Eisini í búskaparpolitikkinum setur javnaðarflokkurin einstøku menniskjuna og vælferð hennara í miðdepulin.

Í valskrá javnaðarfloksins verður ásannað, at inntøkur frá eini komandi oljuvinnu eru ogn Føroya fólks. Við tí í huga, at komandi ættarlið av føroyingum eisini eiga lut í hesum ríkidømi, verða hesar inntøkur settar í grunn. Partar av rentuavkastinum frá hesum inntøkum skulu tó nýtast til varandi íløgur, t. d. á almanna- og heilsuøkinum, á útbúgvingarøkinum og á samferðsluøkinum. Hetta tí, at hesi økir eru týðandi partur av grundarlagnum undir vælferðarsamfelagnum.

Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við tí búskaparpolitikki, sum sitandi landsstýri og sitandi samgonga hava rikið, har fíggjarlógirnar hava avlop hvørt ár, meðan ávís týðandi økir í samfelagnum, sum hava avgerðandi týdning fyri korini hjá fólki, ikki fáa nøktandi játtan. Málið við okkara búskaparpolitikki er: at tryggja øllum mannsømulig fíggjarkor, at tryggja javnt býti av samfelagságóðanum og at tryggja øllum somu møguleikar.

Í valskránni siga vit, at fólk við skerdum møguleika skulu hava virðiligar umstøður, at fyribyrgjandi og viðgerandi heilsuverkið skal styrkjast, og javnaðarflokkurin góðtekur ikki, at deildir á sjúkrarhúsunum av tørvandi játtan verða afturlatnar í fleiri mánaðir á hvørjum ári, og javnaðarflokkurin góðtekur heldur ikki bíðilistar til sjúkraviðgerð. Trupulleikin við tørvandi læknamanningini á smáu sjúkrahúsunum skal loysast, eins og flokkurin vil hava settan serlækna til eldrasjúkur og serlækna í barnapsykiatri.

Vit vilja varðveita, útbyggja og menna vælferðarsamfelagið. Tí virkar flokkurin fyri, at førdur verður ein ábyrgdarfullur fíggjar- og búskaparpolitikkur, ið tryggjar arbeiði til allar hendur, tryggjar javnan búskaparligan vøkstur, sum byggir á vistfrøðiliga trygt og burðardygt grundarlag, tryggjar búskapinum javna og styrki at standa ímóti við í ringum tíðum, og skapar grundarlag fyri økismenning og fjøllbroyttum búsetingarmynstri, soleiðis at útjaðari og miðøki gerast einar heilar Føroyar.

Javnaðarflokkurin ásannar, at alsamt størri tørvur verður á, at vit í Føroyum hava dygg politisk amboð at stýra búskapinum við - amboð, sum vit sjálvi hava ræði á og eftirlit við. Hetta er alneyðugt til tess at tryggja støðufesti í Føroyska samfelagnum. Tí mæla vit til at eitt føroyskt fíggjareftirlit verður sett á stovn beinan vegin.

Politisku ørvitisfiskarnir í borgarligu fullveldissamgonguni eiga ikki at halda fram við at stjórna landinum. Teir leggja almennan pening til síðis við tí endamáli at fíggja eina framhaldandi fullveldistilgongd. Fyri at kunna hetta verður framhaldandi sparingar á almanna- og heilsuøkinum, á útbúgvingarøkinum og á samferðsluøkinum.

Hetta kann forkoma vælferðarsamfelagnum. Tí eiga øll tey, sum vilja varðveita, útbyggja og menna føroyska vælferðarsamfelagið, FÓLKAHEIMIÐ FØROYAR, at fara mannsterk á val og seta ein sterkan javnaðarflokk inn á Føroya Løgting týsdagin 30. apríl.

Eg ynski øllum eitt gott val - og eitt gott val tað er at seta X við lista C ella eitt av valevnum javnaðarfloksins.

# Røktarheim - tunnlar - vinnulív

**Niels Th. Pedersen**
*Fólkafloksvalevni fyri Norðstreym*



Tað er ofta við røttum ført fram, at bráfengis tørvur er á 150 røktarheimsplássum.

Hálvt annað hundrað pláss á 1 millión krónur, svarandi til 150 milliónir, er kostanðurin at fáa røktarheimini bygd.

Siga vit, at land og kommunur býta hesa upphædd sínamillum, eru 75 milliónir í part.

Men hesir pengar eru sera torførir at fáa fram á borðið.

Hyggja vit eftir undirsjóvartunnlum, so er eingin trupulleiki at fáa allar hesar hundraðtals milliónir á borðið. Undanførðslan er hon, at vinnulívið fer fyri bakka, um hesir tunlar ikki verða gjørdir. Hesar milliónir eru klárar við einum títlingabresti.

Teir 150 røktarkrevjandi sjúklingarnir, sum eru heimaliggjandi, leggja, um vit kunna kalla tað so, hald á 150 fólk í besta arbeiðsføra aldri, hesi 150 verða tí ikki tøk á arbeiðsmarknaðinum, samstundis sum tað er ein ótolandi støða hjá allari familjuni.

Samtíðis rópa summi um at fáa útlendska arbeiðsmegi til landið.

Um vit bygdu hesi 150 røktarheimsplássini, so kundu tey 150 arbeiðisføru skyldfólkini, sum ofta fáa samsýning frá tí almenna fyri at røkta tey gomlu, sloppið í lønta vinnu. Nú høvdu so báðir partar fingið eina mannsømiliga tilveru. Tann røktarkrevjandi fekk ta góðu røkt, sum hann hevur uppiborðið, tann arbeiðisføri slapp til verka, og familjan fekk eina normala tilveru.

Men ikki nóg mikið við tí. Hesi 150 høvdu so skapt virði og umsetning, helst omanfyri 150 milliónir, sum so komu okkum øllum til góðar.

Vilt tú, at tað skal vera so, tá velur tú Fólkaflokkin inn á Ting 30. apríl.

Við Fólkaflokskvøðu.

# Javnaðarsamfelag kontra borgarligt samfelag?

**Dan R. Petersen**
*løgtingsmaður*



Fyri mær er javnaðarhugsjónin meira enn ein politisk hugsjón. Hon er ein lívsáskoðan. Hetta at vit øll varða av hvør øðrum, hvat kann vera rættari enn tað.

Tað er ikki av ongum at Norðurlond standa sum idealið verðina runt.

Bert ein orsøk er til tað: Norðurlond eru stórt sæð stýrd av javnaðarstjórnum síðan 30-árini. Sterkastir hava teir verið í Svøríki, har teir hava sitið síðan 1934, 8 ár undantikin.

Vælferð og trygd, góð heilsutænasta, góður skúli fyri øll, høgt undirvísingarstøði og góð arbeiðsmarknarviðurskiftir

Vit kunnu siga at bert í Norðurlondum hevur javnaðarrørslan sloppið at staðið sína roynd, og úrslitini tala fyri seg.

Borgarligir flokkar hava eisini stýrt londum í líka langt tíðarskeið. Nevnliga í Suðureuropa. Serliga lond sum Grikkaland, Italia, Spania og Portugal. Úrslitið kenna vit: Nøkur høvuðsrík, men fjøldin blóðfátæk. Og ikki at tala um Suðuramerika, har javnaðarrørslan ongantíð hevur fingið fótin fyri seg, og teir borgarligu hava verið einaráðandi. Tey viðurskiftir vil eg als ikki taka upp á tungu.

Føroyska samfelagið er bygt eftir norðurlendskum sosialdemokratiskum mynstri, men hesi seinastu 4 árini eru vit gingin afturá, hvat eldrarøkt og heilsutænastu viðvíkir, og vit hava enn verri í væntu, um loysingarsamgongan kann halda fram. Orsøkin er, at hesir flokkar seta nationalismuna hægri enn sosiala trygd og vælferð. Skeiðið hjá samgonguni er nú runnið, og skal vælferðin bjargast komandi árini, er lívsneyðugt at ein sterkur javnaðarflokkur fer at leiða komandi samgongu. Vit vilja ikki eina fáfongda nationalismu, men vælferð og trygd fyri allar borgarar. So valið skuldi verið lætt.

# Aftursvar til Jóannes Eidesgaard

### Til grein í bløðunum 17. apríl

**Finnleif Guttesen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Av søguni skulu vit øll læra um góð og minni góð avrik, sum onnur hava gjørt. Og eg eri púra samdur við Jóannes Eidesgaard, at tað er gott at Smyril og Teistin komu, og at tað var ein skeiv avgerð, at selja Teistan.

Somuleiðis bleiv eg vónbrotin um, at eingin oljuútgerðarhavn var løgd í Suðuroy, men hetta kunnu vit saman broyta, til gagns fyri Suðuroy.

At javnaðarumboðini í Suðuroy standa saman við sambandsumboðunum sum ein maður, fyri at krevja okkara rætt í Suðuroy og í ríkisfelagsskapinum, eri eg heilt vísur í.

Eg kann lova Jóannes Eidesgaard og øllum suðuroyingum, at Finnleif Guttesen fer at blíva við at krevja, at Suðuroy verður javnsett við restina av Føroyum.